# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Løgið, at iranski forsetin, sum styðjar altjóða yvirgang, vil sleppa at vitja Ground Zero í New York (Hvítu Húsini).*

# Sjúk av rúmdarsteini



*Rúmdarsteinurin var so mikið stórur, at benið er fimm metrar djúpt og tjúgu metrar í tvørmát*

**Umleið 200 fólk í Peru eru vorðin sjúk av einum rúmdarsteini, sum datt niður í Andesfjøllunum seinasta vikuskiftið**

- Vit vita ikki rættiliga, hvat er á vási, sigur Jorge Lopez.

Sum leiðari hjá heilsumyndugleikunum í peruanska landspartinum Puno hevur hann verið á staðnum, har ein rúmdarsteinur datt niður seinasta vikuskiftið. Læknar í økinum vita um eini 200 fólk, sum hava kært seg um høvuðpínu, kvalma og trupulleikar við andadráttinum teir seinastu dagarnar, og teir duga ikki at síggja annað, enn at sjúkan hevur eitt ella annað samband við rúmdarsteinin.

- Tað er ikki óhugsandi, at tann nógvi hitin, sum stóðst av sjálvum stoytinum, kann hava sent ymisk sløg av eitrandi gassi út í luftina, og at fólk so hava andað ta eitraðu luftina niður í seg, sigur Renan Ramirez, sum er stjóri á peruanska kjarnorkustovninum. Hann og hansara vísindafólk fara nú at kanna rúmdarsteinin nærri.

# Stýrið hjá Putin er sum mafian



*Garry Kasparov heldur lítið um russisku stjórnina og serliga forsetan, Vladimir Putin*

**Fyrrverandi heimsmeistarin í talvi Garry Kasparov segði sína hjartans hugsan um russisku leiðsluna, tá hann var í Keypmannahavn í gjár**

Garry Kasparov var í Keypmannahavn og tók ímóti einari friðarheiðursløn, sum leiðslan í Pundik-grunninum hevði gjørt av at lata honum, og sum sambært reglunum verður latin fólki, sum stríðast ryri frælsi, demokratii og mannarættindum.

Gamli talvsnillingurin takkaði fyri heiðurin, og á einum tíðindafundi aftaná nýtti hann høvi til at siga, hvat hann heldur um ta politisku leiðsluna í Russlandi og serstekliga Vladimir Putin, forseta. Og hann legði ikki fingrarnar ímillum.

- Stýrið hjá Putin er skipað eins og mafian í andsøgn við øll vesturlendsk virðir, segði Kasparov. Hann fýltist á, at vesturlendskir leiðarar eru skjótir at finnast at leiðarum í eitt nú Kina, Hvítarusslandi og Zimbabwe, men ikki Putin, og tað er dupultmoralur, segði Kasparov.

Tey seinastu árini hevur Garry Kasparov verið virkin í einum politiskum flokki, og á tíðindafundinum segði hann, at hann er til reiðar at stilla upp á russiska forsetavalinum næsta ár, um hann fær eina áheitan frá flokkinum. Hinvegin ásannaði hann, at hansara møguleikar at vinna eru smáir.

## STUTT SAGT

### Ungur dráps-maður

Ein seks ára gamal smádrongur í bosniska býnum Bijelijna skjeyt í gjár sín fimm ára gamla vinmann, sigur bosniska løgreglan. Sreingirnir høvdu eina maskinbyrsu, og tann eldri skjeyt hin. Hann varð raktur í bringuna og doyði á veg á sjúkrahúsið, siga myndugleikarnir. Hóast tólv ár eru liðin, síðani kríggið endaði, hevur Bosnia-Hersegovina framvegis trupulleikar av vápnum, sum vanlig fólk hava um hendi.

### Ein inn tveir út

ST-dómstólurin, sum viðger krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Rwanda í 1994, hevur framvegis ilt við at fáa fatur á teimum, sum eru skuldsettir ella undir illgruna fyri medvirkan í fólkadrápinum, sum kravdi 800.000 mannalív. Í gjár kundi dómstólurin fegnast um, at týska løgreglan hevði handtikið ein mann, sum er undir illgruna fyri krígsbrotsverk í 1994. Men at kalla samstundis komu boð um, at tveir menn, sum vórðu tiknir í Fraklandi herfyri, og sum eisini eru undir illkgruna fyri krígsbrotsverk, vórðu latnir leysir úr varðhaldinum.

### Ágangandi flogmýs

Á Kanarisku Oyggjunum halda tey, at teir ógvusligu skógareldarnir í summar hava ávirkað flogmýsnar, so tær eru vorðnar meiri ágangandi enn fyrr. Myndugleikarnir hava fingið fleiri fráboðanir um, at flogmýs hava lopið á húsdjór, og í einstøkum førum hava tær eisini gjørt seg inn á fólk. Ein djóralækni hevur váttað, at hann hevur viðgjørt nøkur ross, sum vóru bitin, og hann er ikki í iva um, at talan var um flogmúsabit, skrivar blaðið Canariposten.